


**_Nr. 15_** **_23. juli 2017_** **_77. árg._**

# Í troysti á miskunn tína

*Tí at ikki í troysti á egið rættlæti koma vit fram fyri ásjón tína at bøna um náði, men í troysti á tína miklu miskunn.*

*Dán. 9,18.*

Í Gamla Testamenti ljóða djúpir tónar. Her er ein teirra, Dánjal, sum samhugaður er í forbøn fyri fólkinum. „Vit hava syndað, og vit hava slitið trúnað," sigur hann og leggur afturat, „tí at ikki í troysti á egið rættlæti koma vit fram fyri ásjón tína at bøna um náði. Men í troysti á tína miklu miskunn.....Tí at navn títt er nevnt yvir borg tíni og yvir fólki tínum!" Soleiðis biður tann, sum er í syndaneyð.

Men tíð okkara veit ikki, hvat syndaneyð er. Fólk halda tað vera hysteriskt at nevna orðið, og tey rista við høvdinum, eins og var ongin orsøk at halda, at menniskjan hevur medábyrgd av støðuni, sum hon nú er, við nógvum ruðuleika í tíðini! – Nei, vit hava øll medábyrgd, og skal tað lýsa fyri degi, mugu tað vera nøkur, sum eru fús at gera bót og leita inn undir Guds miskunn.

„Ikki eru tað okkara rættvísu gerðir, sum fáa okkum at bøna og biðja teg, Gud, men tín stóra miskunn." Latið okkum minnast til tað. Vit seta krøv, tá ið vit biðja. Gud má leggja uppí, og tað skal vera beinanvegin. Um hann er góður og altvaldandi, mátti hann kunnað svarað kravi okkara við einum **ja** beinanvegin. Ger hann ikki tað, gerast vit firtin.

Tað er vandamikið at seta krøv, um ein er sekur. Sannleikin er tann, at vit onki hava at leita til uttan Guds markleysu náði.

Og um undirtónin í bøn okkara ikki er: „***Miskunna mær***!“ er bønin ikki sonn, og tá kunnu vit ikki undrast, um onki svar tykist koma.

Orðini bót og bøn eru nær skyld, tí boyggja vit okkara knø, tá ið vit biðja.

*Jesus, eg sveik so mangan teg,*
*flýddi, tí mót mær treyt,*
*og tá ið bar mót trongum veg,*
*fann eg mær aðra breyt.*

*Jesus, eg nígi fyri tær,*
*biði í iðran her:*
*skjøldur og svørð tú gevi mær,*
*royn meg enn einaferð!*

# Styrki og veikleiki

Býurin Edinburgh er kendur fyri borgina, sum tað bert einaferð er eydnast fíggindanum at taka. Bara einastaðni løgdu tey á borgini alla orku í at verja. Tey hildu, at brøttu líðina hinumegin fór ongin at klára at taka. Tí vórðu ongir hermenn settir í líðina at verja. Men júst tað kláraði ein álopsbólkur – at berja seg upp gjøgnum brattan og taka borgina. Tí har, sum íbúgvarnir hildu borgina vera sterka, var hon veik. Soleiðis kann eisini gangast okkum. Um ein persónur fellur, kann tað vera í onkrum, har vit halda okkum klára at standast.

Í øllum lívsins viðurskiftum mugu vit vera nóg eyðmjúk at biðja Gud vera styrki og vernd okkara. Bíblian sigur „*Men Gud alrar náðar, sum kallaði tykkum til sína ævigu dýrd í Kristi Jesusi....*
*hann skal sjálvur gera tykkum fulldugandi, menna, styrkja, grundfesta tykkum.*“

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

# Bønir, sum flyta fjøll

*„... Tann, ið sigur við hetta fjallið..." Mark. 11,23.*

Kennir tú tað, sum at tann trupulleikin, sum tú nú stendur beint frammanfyri, er stórur sum eitt fjall?" Jesus svaraði og sigur við teir: „Havið trúgv á Gud! Sanniliga sigi eg tykkum: Tann, ið sigur við hetta fjallið: „Lyft teg upp og kasta teg í havið," og ikki ivast í hjarta sínum, men trýr, at so verður, sum hann sigur, tá skal tað verða honum fyri. Tí sigi eg tykkum: „Alt tað, sum tit biðja um og tráa eftir, trúgvið, at tit hava fingið tað, tá skal tað verða tykkum fyri. Og tá ið tit standa og halda bøn, tá fyrigevið, um tit hava okkurt ímóti onkrum, at faðir tykkara, sum er í himlunum, eisini má fyrigeva tykkum misgerðir tykkara. Men um tit ikki fyrigeva, tá skal faðir tykkara, sum er í himlunum heldur ikki fyrigeva misgerðir tykkara." Mark.11,22–26.

Her gevur Jesus okkum tríggjar lyklar til at fáa svar upp á bøn.

**1)** Halt á at tala Guds orð inn yvir tín trupulleika „...orð mítt, ið fer av mínum munni, skal ikki venda aftur við ongum, men útinna tað, sum mær líkar, og fremja tað, sum eg sendi tað til." Jes. 55,11.

**2)** Halt á at mata tína trúgv og „hungra" tín iva. „Alt tað, sum tit biðja um og tráa eftir, trúgvið, at tit hava fingið tað, tá skal tað verða tykkum fyri." Mark. 11,24.

**3)** Halt á at fyrigeva. „Tá ið tit standa og halda bøn, tá fyrigevið, um tit hava okkurt ímóti onkrum..." Mark. 11,25. Tað fjallið, sum fyllir lív títt, kann ikki flytast, um tú hýsir einum ófyrigevandi anda. Guds vilji at bønhoyra teg er treytaður av tínum vilja at fyrigeva teimum, sum særa teg. Spyr tí teg sjálvan: „Er tað vert at halda fast í hesum beiskleikanum?"

Bernhard Meltzer sigur: „Tú broytir als ikki fortíðina, tá ið tú fyrigevur, men tú broytir heilt vist framtíðina." Uttan mun til, um tú heldur, at tann, sum særdi teg, hevur uppiborið at fáa fyrigeving ella ikki, fyrigev so fyri tína egnu skuld – so at fjallið kann flytast.

„... et Ord til Dagen"
*Effie Campbell* umsetti.

# Tríhæddað hús

*Hetta fólkið ærir meg við vørrunum; men hjarta teirra er langt burtur frá mær. Matt.15,8.*

Ein týskur høvundur skrivar einastaðni um hjartað og samanber tað við eini tríhæddað hús. *„Hvussu lættliga verður ikki stríð millum leigararnar í einum tríhæddaðum húsum! Nógv øðrvísi hevði verið, um bara eitt húski búði í húsunum. Nú má eg tíverri siga, at mong Guds børn hava tílíkt tríhæddað hjarta.*

*Í miðhæddini býr Frelsarin. Tann hæddin er játtað honum. Men uppi á kvistinum býr ein annar. Royn onkuntíð at lesa navnið á navnaskeltinum á hurðini – eitt stutt navn! Hann eitur EG. Og í stovuni búgva lystir og girnd. Tað, sum Jesus ger og boðar í hjartanum, fær altíð ein atfinnara. EG–ið dregur alt fyri ein dómstól. Tað finst at øllum og dømir alt.“*

Hesi orðini eru beinrakin og lýsa mong kristin fólk. Kanska teg eisini. Um so skuldi verið, ert tú ikki frægari enn hinir dømandi farisearararnir, sum skriftorðið her omanfyri talar um. Men av tí at Jesus hevur keypt okkum við sínum dýrabara hjartablóði, so hevur hann eisini uppiborið at eiga alt hjartað og eiga tað einsamallur.

Tveit EG–ið út á gøtuna, tað hevur onki annað uppiborið. Fyri at tú skalt ikki gloyma tað – ger tað beint nú!

*t.* týddi.

---

## Guds orð

„Sonur mín, gev orðum mínum gætur, vend oyra tínum til talu mína. Lat tey ei víkja frá eygum tínum, varðveit tey innast í hjarta tínum. Tí at tey eru lív fyri teimum, ið finna tey, og heilsubót fyri alt teirra likam.” Orðt. 4,20–22. Bíblian er Guds heilaga bók. Í Bíbliuni er tað Gud, sum talar til okkara. Vilt tú, at Gud skal tala til tín? Bíblian er Guds tala til tín.

*e.c.* ums.

---

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
**Repro– & prent:** Prenta, 35 77 74




*Nr. 16* *6. august 2017* *77. árg.*

# Guds kærleiki í Jesusi Kristi

*Tit, sum áður ikki vóru eitt fólk, men nú eru Guds fólk, tit, sum ikki funnu miskunn, men nú hava fingið miskunn.*
*1.Pæt. 2,10.*

Fólkið í einum landi hevur ein samleika. Har má vera okkurt, sum bindur tað saman og skapar eitt samband, sum ger, at tað upplivir seg sum eina eind. Allir ríkisleiðarar eru upptiknir av at halda fólkinum saman og syrgja fyri at leggja dent á okkurt, sum skapar eitt slíkt samband. Annars fer hetta fólkið fyrr ella seinni til grundar.

Tey, sum her verða umrødd sum Guds fólk, vóru ikki áður eitt fólk. Har var onki, sum bant tey saman og skapaði samleika og samanhald. Tey høvdu hvørki felags mál, søgu, mentan, rasu ella lívskor.

Men nú eru tey vorðin eitt fólk. Í miskunn síni hevur Gud givið teimum ein samleika og eina sterka fatan og uppliving av samanhaldi. Alt tað hava tey fingið, tí tey hava funnið miskunn hjá Gudi. Skriftorðið her omanfyri undirstrikar, at her er ikki talan um okkurt, sum tey sjálvi hava fingið í lag. Tað, sum bindur tey saman, er tann gripurin, sum eitur Guds frelsa í Jesusi Kristi.

Og soleiðis er tað framvegis. Tað, sum bindur Guds fólk saman, er, at vit hava borið eyga við Guds kærleika í Jesusi Kristi. Hann skapar tann sterkasta felagsskapin, ið hugsast

kann. Hann er ikki bundin at styrki okkara, men hansara. Hoyra vit til tað fólkið, sum hevur funnið miskunn, hava vit eitt trygt samfelag við Gud og okkara millum.

*Um nú nýggjar øldir líða,*
*halt á somu leið várt starv,*
*at vit ikki lata svíða*
*dugnaloysi til hin arv,*
*sum vit ervdu fedrum av;*
*tá skal lyftið, sum tú gav,*
*allan aldur Føroyum tryggja*
*føroyingunum her at byggja.*

# Vónin

*Veldi títt og rættvísi tín røkka, o Gud, til himna,*
*stórverk hevur tú int, Gud, hvør er líki tín.*
*Sálmur 71, 19.*

Tá ið trupulleikarnir hópa seg upp, og mótloysið ger meg bangnan, kemur vónin við nýggjari troyst og nýggjum dirvi. Og brestur vónin, gevur Gud nýggja vón. Tí gevst Guds fólk ongantíð á hendur.

Vit halda fram at stríðast reyst og sterk, tí vón okkara er, at hóast vit tapa í stórum, so skulu vit tó at enda sigra. Vónin ger framtíðina bjarta við ríkum fyrijáttanum. Var tað ikki so, var vónin ikki hin ókúgandi mátturin, sum hon er.

Guds kirkjulið letur ongantíð nakran taka hesa vón frá sær, sum Gud í náði hevur givið okkum. Hin spottandi heimurin uttan um okkum er vónleysur og gudleysur og nærkast undirganginum. Men Guds kirkjulið hevur vón um æviga dýrd hjá Gudi. Tí vilja vit altíð vóna og halda fram at lovprísa Gudi. „Men eg vil tær lova við hørpuslátti, Gud, fyri trúfesti tína.“ (Sálmur 71,22).

Men vónarinnar Gud fylli tykkum við allari gleði og friði í trúnni, so at tit mega vera ríkir í vónini við kraft Heilaga Andans. (Róm. 15,13).

*t.* týddi.

# Navnið hevur týdning

Ein maður var á ferð, hann skuldi av landinum. Hann hevði hoyrt um eina fyritøku í hinum endanum á býnum; hon æt Tímareins. Hann tók klædningin við sær, fann fyritøkuna, fylti út eitt oyðiblað og spurdi, um hann kundi koma aftur eftir klædninginum um ein tíma. „Nei," segði tann, sum avgreiddi hann, „tygum fáa hann ikki fyrr enn hósdagin." „Eitur fyritøkan ikki „Tímareins?" „Jú, men tað er bara navnið á fyritøkuni."

Hjá summum er kristindómur bara eitt navn og eitt merki. Hann hevur onki innihald. Hann broytir onki. Okkum nýtist ikki at vera sera gudrøkin ella óvanliga djørv fyri at vera kristin. Jesus fer á evsta degi at taka ímóti teimum, sum tóku navn hansara í álvara og vilja fylgja honum í lívinum. Bíblian sigur: *„Eg veit um gerningar tínar.... tú hevur lítlan mátt, og kortini hevur tú varðveitt orð mítt og ikki avnoktað navn mítt."* (Opb. 3,8).

# Biðið hvønn dag

*„Biðið...leitið...bankið uppá..." Matt. 7,7.*

Hin viðgitni evangelisturin, R. A. Torrey, segði, at tvey tey størstu loyndarmálini aftan fyri virkna bøn lógu í hesum:

**1)** At granska Guds orð og síggja vilja hansara opinberast í lyftunum.

**2)** At taka hesi lyfti og halda tey upp fyri Gud í bøn við einari óvikandi trúgv á, at hann ger, sum hann sigur.

Gev ikki tær sjálvum loyvi at liva eitt lív uttan bøn. Lat ikki strongd avgera, hvussu nógva tíð tú vilt brúka til at sita við føturnar á Frelsara tínum. Tráa eftir sovorðnum løtum. Legg tær til rættis. Verj tær.

Grace L. Naessens sigur tað á henda hátt í yrking síni „Munurin": „Eg vaknaði tíðliga ein morgunin og leyp beint inn í dagin; eg hevði so nógv at gera, at eg hevði ikki stundir at biðja. Trupulleikar bara bóltaðu inn yvir meg, og hvør uppgáva

var torførari enn tann undanfarna. „Hví hjálpir Gud mær ikki?“ hugsaði eg. Hann svaraði: „Tú biður meg ikki um tað.“ Eg tráaði eftir at síggja gleði og vakurleika, men hesin dagurin fekk ongan enda, var gráur og dapur. Eg hugsaði um, hví Gud ikki vegleiddi meg. Hann segði: „Tú søkir meg ikki.“ Eg royndi at koma inn í nærveru Guds; eg royndi á allar møguligar mátar at fáa hurðina upp. Gud fanst blídliga og kærleiksfult at mær: „Mítt barn, tú bankaði ikki uppá.“

Eg vaknaði tíðliga í morgun og fekk mær eina stilla løtu, áðrenn eg fór undir dagin í dag. Eg hevði so nógv at gera, at eg mátti taka mær tíð at biðja.“

Um tú ert klók, heldur tú fast upp á tína bønastund, so tú ert til reiðar at møta lívsins kreppum, tí teimum slepst ikki undan. Tað er tápuligt at bíða við at fremja andaligt lýdni, til trupulleikarnir hópa seg upp framman fyri tær.

„... et Ord til Dagen“
*Effie Campbell* umsetti.

---

# Hvørjum roynir tú at tekkjast?

„Lat orð muns míns og hugsanir hjarta míns líka Tær, Harri...“ Sálm. 19,15 (V.D.) Ræðist tú fyri, at onnur skulu halda lítið um teg, um tú tekur til orðanna og sigur tína hugsan? Bíblian sigur: „At ræðast menniskju leiðir í snerru...“ Orðt. 29,25 (V.D.) Og ótti er vanligur hjá fólki, sum fegin vilja tekkjast øðrum. – Tað einasta, vit skulu hugsa gjølla um, er at tryggja okkum, at orð og tankar okkara líka Harranum. Í síðsta enda er tað bara hansara góðkenning, sum telur.

*e.c.* umsetti.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
**Repro– & prent:** Prenta, 35 77 74